# Maibritt og Guðrun ársins






Maibritt Magnussen og Oddmar Joensen vóru bæði rørd, tá tey tóku ímóti heiðrinum frá Dimmalætting

**Tað gjørdust tær báðar flogternurnar frá flogvanlukkuni í Stord, sum fingu heiðurin frá Dimmalætting sum ársins føroyingar. Petur Jacob Sigvardsen fekk heiðurin fyri ársins mentanarbragd, Elspa Mørkøre fyri ársins ítrottarbragd og The Dreams áttu ársins fløgu**

ÁRSINS

*Rólant Waag Dam*
*Myndir: Àlvur Haraldsen*

Dimmalætting hevði í gjár skipað fyri stórum tiltakið, har teir skuldu avdúka hvat lesarar teirra meta um, hvør hevur framt ársins mentanarbragd, ítróttarbragd og ársins fløgu. Harnæst skuldi ein dómsnevnd kjósa ársins føroying.

Nógv fólk var savnað í blaðhúsinum á Smyrilsvegi, og í millum avdúkingarnar kundu tey mongu uppmøttu nýta frálíka tónleikin og lætta og góða matin, sum var at fáa.

## Aldur ongin forðing

Fyrsta ársins handanin sum var, var tá ítrottarskrivarin hjá Dimmalætting, Emil L. Jaacobsen, skuldi avdúka hvør hevði framt ársins ítrottarbragd. Emil L. Jacobsen vísti í lítlu røðu síni á, at tey fimm tilnevndu vóru eitt prógv um, at aldur er ongin forðing, tá tað kemur til at fremja ítrottarbrøgd.

Lesararnir hjá Dimmu flestir samdir um, at unga svimjigentan úr Gøtu hevði framt ársins ítrottarbragd í Føroyum 2006. Hetta er annað árið ár rað, at lesararnir velja hana til henda heiður, og tað í sjálvum sær er eitt prógv um, hvussu dugnalig Elspa Mørkøre er

- Eg eri púra paff. Eg hevði slett ikki væntað hetta, so eg eri ordiliga glað fyri henda heiðurin. Eg haldi, at tað er næstan stuttligari at vinna hetta fyri aðru ferð, segði Elspa Mørkøre við Sosialin eftir hon hevði fingið heiðurin.

## Eru betru megin 30

Tá fyrsta handanin var fingin frá hondini, trein Martin Joensen á pallin, saman við Paula Magnussen og Eyðun Hansen. At teir fóru á pallin er kanska í so nógv sagt, tí pláss var bara fyri tveimum teirra á pallinum, sum var heldur lítil. Væl ljóðaðu løgini kortini.

Síðani fekk tónleikaummælarin hjá Dimmalætting, Jan Lamhauge, mikrofonina. Hann gleddist um, at tónleikararnir sum vóru millum teir tilnevndu bólkarnar til ársins fløgu, allir vóru betru megin tey 30, sum hann málbar seg.

Jan Lamhauge greiddi frá, at tveir bólkar høvdu beinanvegin skilt seg frá hinum, men tá saman um kom, var vinnarin ungi punkbólkurin The Dreams, sum millum annað stóð aftanfyri størstu landapláguna í fjør, Sasa Sa, Sa.

## Eitt siðsøguligt bragd

Eftir hetta sluppu tey mongu uppmøttu at leggja oyra til framúrskarandi sang frá Rúna Brattaberg, aftur við fylgispæli frá Jóannes Andreassen. Rúni Brattaberg stóð á gongubrúnni uppi yvir samkomuni og hansara orkumikla, djúpa og fantastiska rødd fylti alt blaðhúsi á Smyrilsvegi.

Tá Rúni Brattaberg takkaði fyri seg eftir miklan lógvabrest úr salinum, var tað marknaðarleiðarin hjá Dimmalætting, Signar í Homrum, sum skuldi avdúka, hvør var útnevndur at fáa nýggjasta heiðurin hjá Dimmalætting, ársins mentanarbragd.




*Annað árið á rað fekk Elspa Mørkøre heiðurin fyri Ársins ítróttarbragd*

Hesum slapp Petur Jacob Sigvardsen at taka ímóti, fyri drúgva verk hansara um torvið í Føroyum.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í Mentamálum, helt aftaná eina minni røðu.

– Felags mentan okkara er tað, sum heldur okkum saman sum fólk, segði Jógvan á Lakjuni. Hann takkaði Petur Jacob Sigvaldsen fyri stórarbeiðið hann hevði gjørt, og segði seg við vissu kunna siga, at Petur Jacob Sigvaldsen hevur bjargað allari tí vitan um torv, sum finst í skrift og talu.

– Hetta er eitt valaverk, sum eigur at gerast fólkaogn – eitt siðsøguligt bragd er tað, sum Petur Jacob hevur avrikað, helt Jógvan á Lakjuni fyri.

## Sjónliga rørd

Frá landsstýrismanninum var farið beinleiðis víðari til hæddarpunktið á kvøldinum, tá ársins føroyingur skuldi avdúkast. Til at finna fram til ársins føroying hevði Dimma sett eina dómsnevnd mannaða av Edmund Joensen, løgtingsformanni, Jóan Paula Joensen, rektara, Heðin Mortensen, ÍSF forseta og Oddfríður Marner Rasmussen, formanni í Listasamband Føroya.

Tað var Ingi Samuelsen, blaðstjóri á Dimmalætting,